## Boð, treytir og forboð

Um húsdýrahald av flogfenaði, hóast reglugerðina, elvir til ampa, sum stink, gang, nógva flugu, rottu, kann Tórshavnar kommuna seta forboð fyri haldinum ella áleggja treytir fyri at flogfenaðhaldið kann halda fram. Kommunan kann eisini geva ítøkilig boð um ábøtur ella broytingar í flogfenaðhaldinum.

## Kæra og revsing

- Avgerð hjá Tórshavnar kommunu kann kærast til Heilsufrøðiligu starvsstovuna.
- Um treytir sambært hesi reglugerð, boð ella forboð ikki verða hildin, kann brotið verða revsað.




**Tórshavnar kommuna**

Postsmoga 32
110 Tórshavn
Tel 30 20 10
Fax 30 20 11
torshavn@torshavn.fo
www.torshavn.fo

Mánadag-fríggjadag 9-16
tó hósdag 9-18


# Flogfenaðhald

Umhvørvi



Tórshavnar kommuna



## Reglugerð fyri flogfenahald

Tórshavnar býráð hevur á fundi 6. oktober 2005 samtykt reglugerð fyri flogfenahald, har endamálið við reglugerðini er at tryggja, at flogfenaðhald ikki elvir til ampa fyri grannar og onnur.

Heilsufrøðisliga starvsstovan hevur tann 28. oktober 2005 góðkent reglugerðina.

Reglugerðin verður sett í gildi við heimild í §§ 23, 26 og 32 í kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994.

Faldarin er ein samandráttur av reglugerðini.

Reglugerðin kann fáast í Snarskivuni. Eisini ber til at finna reglugerðina á heimasíðuni www.torshavn.fo.

## Spurningar

Eru ivamál ella spurningar í sambandi við flogfenaðhald, kanst tú venda tær til Snarskivuna.

## Nýtt flogfenaðhald

Tey, ið ætla at fara at halda flogfenað, eiga at boða næstu grannum sínum frá og spyrja seg fyri hjá kommununi um ivamál.

## Flogfenaðhald, sum er

Flogfenaðhald, ið longu er skipað, áðrenn reglugerðin kom í gildi, kann halda fram, sum er, men kann tó koma undir meginreglurnar um, hvussu gerast skal við búr, girðing, fóður, tøð og so framvegis. Krøv ella forboð kunnu verða sett teimum, ið hava flogfenaðhald.

## Hvønn fatar reglugerðin um

Reglugerðin fatar um bæði nýggj flogfenaðhald og tey, sum eru í øllum tættbygdum øki (býarlíkum býlingum) í kommununi. Tó er vinnuligt virksemi sambært kap. 5 í lóg um umhvørvisvernd undantikið.

## Reglurnar umfata:

Koltur, Hest, Nólsoy, Kollafjørð,
Kaldbak, Hoyvík og Tórshavn

## Reglurnar umfata ikki:

Hvítanes, Norðradal, Syðradal,
Velbastað og Kirkjubø

## Meginregla

Tey, ið fara undir at halda høsn, gæs, dunnur, kalkunir, dúgvur og aðrar fuglar, skulu gera tað í samsvari við fylgjandi reglur:

## Krøv til búr, hús og tílíkt

- Ikki er loyvt at hava flogfenað gangandi leysan á gøtu, vegi ella øðrum øki, sum er opið fyri vanligari ferðslu ella aðrari atgongd hjá fólki.
- Búr, hús ella tílíkt bygningskent tilhald hjá flogfenaði skal vera í minsta lagi 2,5 m frá marki til granna.
- Búr og hús skulu lyftast 0,35 m upp frá jørðildinum at tryggja móti rottu. Tó ikki gásarhús, ið kunnu vera grivin niður í svørðin.
- Búr, hús o.t. skulu regluliga sópast og haldast rein.
- Hanar mugu ikki vera uttandura millum kl. 21 á kvøldi og kl. 8 á morgni.

## Krøv til garðar, girðingar og tílíkt

- Girðing skal antin vera púra tøtt, ella vera í minsta lagi 0,5 m frá marki til granna, tá talan er um hegn, rimagarð ella tílíkt.
- Girðingin skal gerast forsvarliga, eisini so at annar fuglur ikki fær flogið inn, og um neyðugt, skal net spennast yvir. Girðingar skula haldast í góðum standi.

Víst verður annars til »Lov nr. 171 af 18. maj 1937 for Færøerne om hegn og markfred«, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 17. mars 1951.

## Fóður og tílíkt

- Fóður skal goymast í rottutryggum íløtum.
- Leivdir frá húsarhaldinum kunnu bert gevast sum fóður, um avlop verður tikið burtur beint eftir, at tað er givið og í seinasta lagi á kvøldi.

## Krøv um skráseting av flogfenaði

Við heimild í §9 í Djóraverndarlógini, løgtingslóg nr. 16 frá 23. februar 2001 um djórasjúkur, áleggur Heilsufrøðiliga starvsstovan øllum kommunum, at skráseta hvør hevur flogfenað í kommununi.

Skrásetingin fevnir um navn, bústað, slag og tal av flogfenaði. Tað er tískil ábyrgd hjá øllum borgarum í Tórshavnar kommunu, ið hava flogfenað, at boða Snarskivuni frá hesum.

## Tøð

- Tøð (skarn) frá húsdýrahaldinum skal antin burturbeinast til tyrvingarplássið ella gravast niður á egnari grund, í minsta lagi 2,5 m frá marki til granna.